# Føroyar runnu bara aftaná



## HAGTØL UM DYSTIN

| | Slovenia | Føroyar |
|---|---|---|
| Mál: | 5 | 1 |
| Royndir á málið: | 12 | 3 |
| Royndir framvið málinum: | 15 | 0 |
| Gul kort: | 1 | 5 |
| Reyð kort: | 0 | 0 |
| Fríspørk framd: | 11 | 13 |
| Hornaspørk: | 13 | 2 |
| Rangstøður: | 2 | 2 |

*Hagtøl frá uefa.com*

*Slovenia hevði gott tak á Newcastle framherjanum, Joan Símun Edmundsson og hinum føroyingunum*

*Mynd: Polfoto*

**A-LANDSLIÐIÐ** Tim Matavz var stóra hetjan í Slovenia fríggjakvøldið. Føroyska landsliðið hevði millum lítið og einki at bjóða og tapti uppiborið við fýra málum

Uni Holm Johannesen

– Tað er ikki altíð lætt, tá tú er stórur favorittur, segði Matjaz Kek, venjari hjá Slovenia, á tíðindafundinum aftaná dystin, sambært heimasíðuni hjá UEFA.

Nei, hann hevur helst rætt.

Men hendan dagin var tað lætt.

Avrikið hjá føroyingunum staðfesti væl og virðiliga munin millum føroyskan fótbólt og slovenskan fótbólt.

– Vit spældu við sjálvsáliti frá byrjan, og eg eri errin av leikarunum, var stutta, men greiða niðurstøðan hjá slovenska venjaranum.

Føroysku spælararnir, sum Brian Kerr hevði valt sum sínar stríðsmenn, royndust væl fyrstu løtuna. Men so skjótt Tim Matavz sendi heimaliðið á sigurskós, so var liðugt. Slovenia spældi føroysku spælararnar sundur og saman.

### Málskjúttin Matavz

Tim Matavz stóð fyri trimum av málunum hjá Slovenia.

Føroyska miðverjan, sum var manna við Atla Gregersen og Egili á Bø, fekk ongantíð tamarhald á framherjanum, sum spælir við FC Groningen í Hollandi.

Fyrst stýrdi hann bóltinum í málið aftaná innlegg úr høgru.

So sneiddi hann Atla Gregersen av, áðrenn hann økti til 2-0.

Og miðskeiðis í seinna hálvleiki skeyt hann sítt hattrick, tá føroyska verjan var lítið sannførandi í sínum spæli.

Matavz fekk stundum nógv pláss, eins og viðleikararnir høvdu nærmast fríar teymar á hálvuni hjá føroyingunum.

### Mikkelsen royndist væl

Jákup Mikkelsen var aftur í føroyska málinum.

Málverjin var mest eyðsýndi føroyingurin og staðfesti, at hann hevur framvegis landsliðsstøði.

Hann stórbjargaði fleiri ferðir og hevði lítlan møguleika, tá mótstøðumenninir skutu seg á máltalvuna.

Tað varð væntað, at trýstið fór ikki at vera eins stórt í seinna hálvleiki, tí Slovenia skal spæla móti Italia í annað kvøld. Men tað legði heimaliðið ikki petti í. Teir spældu við fullari megi, og so hugdu føroyingarnir bara at.

### Fingu so mál

Tað var lítið at frøast um hjá føroyska liðnum í Ljubljana fríggjakvøldið.

Tá tríggir minuttir vóru spældir av tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, gjørdi Christian R. Mouritsen sær dælt av verjumistaki og minkaði um munin.

Hóast tað hjálpti eitt sindur, so hjálpti tað ikki serliga nógv.

Slovenia vann 5-1, og tað var ikki eitt mál ov lítið.

*uni@sosialurin.fo*

## Símun og Jóhan sótu uttanfyri

Símun Samuelsen, HB, og Johan Troest Davidsen, NSÍ, vóru ikki við fríggjakvøldið vegna skaða. Teir hava verið stuðulsleikarar á landsliðnum seinastu árini, og tað kom sjálvsagt dátt við hjá landsliðsvenjaranum, at teir ikki vóru tøkir. Símun Samuelsen var skaddur í hælsinuni, og Johan Troest Davidsen hevði fingið ein stoyt í knæið. Jann Ingi Petersen, NSÍ, var leingi ivasamur, tí hann hevði ein snudd í baklærinum. Hann kom á vøllin, tá lítil løta restaði í av dystinum.

## Bíligt brotsspark

Matt Holland, sum er viðmerkjari hjá SkySports 1, metir, at brotssparkið, sum Slovenia fekk móti Føroyum, var sera bíligt. Fríggjakvøldið vístu SkySports1 hæddarpunkt frá dystinum í Slovenia. Tá støðan við brotssparkinum kom á skíggjan, spurdi verturin, um Matt Holland metti, at tað var brotsspark. Hann var sera ivasamur á málinum og kom til ta niðurstøðu, at hóast Hendrik Rubeksen hevði hondina um mótstøðuleikaran, so var brotssparkið sera bíligt. Slovenia økti tá til 4-0.

## Slovenia - Føroyar 5-1 (2-0)

Ljubljana, Slovenia
16.000 áskoðarar
Dómari: Stanislav Todorov, Bulgaria
Linjuverjar: Nikola Dzhuganski og Nikolay Petrov, Bulgaria

**1-0: Tim Matavz, 25.**
**2-0: Tim Matavz, 36.**
**3-0: Tim Matavz, 65.**
**4-0: Milivoje Novakovic, brts., 72.**
**5-0: Zlatko Dedic, 84.**
**5-1: Christian R. Mouritsen, 90.**

**Slovenia:** Samir Handanovic, Udinese – Miso Brecko, FC Koln, Marko Suler, KAA Gent, Bostjan Cesar, Chievo, Robert Koren, Hull City, Valter Birsa, Auxerre (Andraz Kirm, Wizla Krakow, 51.), Milivoje Novakovic, FC Koln, (Zlatko Dedic, Bochum, 73.), Bojan Jokic, Chievo, Aleksander Radosavljevic, ADO Den Haag, (Armin Bacinovic, Palermo, 59.), Josip Ilicic, Palermo, Tim Matavz, FC Groningen
Uttan at verða skiftir inn: Jasmin Handanovic, Empoli, Zlatan Ljubiljankic, KAA Gent, Dalibor Stevanovic, Vitesse, og Matej Mavric, SV Kaåfenberg.
Gult kort: Bostjan Cesar, 29.
Venjari: Matjaz Kek
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, ÍF – Jónas Tór Næs, B36, Atli Gregersen, Ross County, Egil á Bø, EB/Streymur, Hendrik Rubeksen, HB – Bogi Løkin, NSÍ (Hjalgrím Elttør, B36, 41.), Fróði Benjaminsen, HB, Jústinus R. Hansen, NSÍ, Daniel Udsen, Christian Lamhauge Holst, Silkeborg, (Christian R. Mouritsen, B36, 81.), EB/Streymur, (Jann Ingi Petersen, NSÍ, 81.) – Jóan Símun Edmundsson, Newcastle
Uttan at verða skiftir inn: Tórður Thomsen, HB, Arnbjørn T. Hansen, EB/Streymur, Jonhard Frederiksberg, NSÍ, og Rógvi Baldvinsson, Ålgaard IF.
Gult kort: Jústines R. Hansen, 17., Atli Gregersen, 26., Fróði Benjaminsen, 52., Hendrik Rubeksen, 70.